VÍF-Neistin 25-17 (14-4):

# Alt ov lítið

**Kvinnurnar hjá VÍF vunnu trygt á Neistanum sunnudagin, sum skal prísa seg lukkuliga fyri ikki at tapa við nógv størri tølum, enn talan gjørdist um**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*VÍF gav Neistanum bank sunnudagin, men tað kann gerast dýrt hjá teimum gulu, at tær ikki vunnu við munandi størri tølum*

Skuldi tað hent seg, at landskappingin háttar seg so, at VÍF eftir seinasta leikdag bert er nøkur mál frá at endurvinna FM, so er lítið at ivast í, at tankarnir fara at leita aftur til dystin móti Neitanum sunnudagin.

### Klassamunur

Tað er nenliga einki at at ivast í, at VÍF var so ruddiliga við yvirlutan allan dystin. Hálvleiksstøðan boðar frá eini nærum óhoyrdari leikligari yvirvág, og munurin í málum avspeglaði so dyggiliga klassamunin, sum var millum liðini.

Tað er einki dulsmál, at Neistin í ár als ikki hevur havt somu styrki, sum tær vanliga hava havt, og tá talan so eisini var um ein somikið ringan dag, sum tað var sunnudagin, so er mest sum einki at gera. Snøgt sagt, so riggaði hvørki eitt ella annað hjá Neistanum. Skeivar sendingar í hópatali, lág leikferð og illa plaserað skot settu dagsskránna, og tá so er, er meira enn trupult at fáa nakað burtur úr móti FÍF.

Heimaliðið tóktist hinvegin at trívast heilt væl. Mongu mistøkini hjá Neistanum førdu við sær, at møguleiki beyðst fyri hópin av mótálopum, og í allar flestu førum kastaðu hesi eisini mál av sær.

Hvussu dagurin var hjá liðunum báðum varð kanska best undirstrikað í seinasta minuttinum av dystinum. Fyrst átti Neistin brotskast, sum varð misnýtt, og tá VÍF í seinasta sekundinum vann sær tríggja-metur kast, sendi Jacklin hetta upp um múrin og í meskarnar.

### Kann kosta

Í seinna hálvleiki var líkt til, at VÍF skuldi halda áfram við avbukingini. Eftir tíggju minuttum var støðan 18-6, men so fór ferðin á spælinum niðureftir.

Ein partur av frágreiðingini var ivaleyst tann mentali, soleiðis at VÍF ikki longur tímdi at ómaka sær fyri at gera sigurin so stóran sum gjørligt, men sum nevnt omanfyri, so kann hetta tó vísa seg at gerast kostnaðarmikið.

Enn hevur VÍF í øllum førum teoretiskan møguleik at vinna VB aftur. Til hetta krevst, at VÍF vinnur allar sínar dystir, umframt at VB – um VÍF vinnur innanhýsis dystin teirra millum – eisini skal tapa ein anna dyst. Hendir hetta, so eru VÍF og VB ájøvn í stigum, og tá kann tað gerast dýrt, um sigrarnir ikki gerast nóg stórur, tá møguleiki býðst.

Ein slíkan møguleika hevði VÍF sunnudagin, men hesin varð so ikki gagnnýttur í nóg stóran mun.

### Dysturin í tølum

VÍF-Neistin 25-17 (14-4)
Málskjúttar:
VÍF: Jacklin Durhuus 7, Nicolina Eyðbjørnsdóttir 6, Sóley Mikkelsen 4 (1), Alis Høghamar 3, Nicoleta Radu 3 (1), Sára Jógvansdóttir 1, Eyðritt Andreasen 1
Neistin: Simona Dziugyte 6 (3), Jórun Ludvig 3, Ata Høgnadóttir 2, Súna Mørk 2 (1), Ása á Neystabø 1, Mildrið Jacobsen 1, Anna Clementsen 1, Susan Brockie 1
Brotskøst: VÍF 3, Neistin 5
Útvísingar: VÍF 2, Neistin 1
Dómarar úr Kyndli: Hannis Wardum & Eyðun Samuelsen. Dysturi tók bert 75 minuttir at avgreiða, og tað sigur helst tað mesta um, hvussu lítið dómaranrir høvdu at gera.

## Máltindarnir

**Kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Daiva Tuomaite | VB | 136 | (29) |
| Asta Petrauskiene | StÍF | 126 | (39) |
| Lotte Sørensen | Kyndil | 122 | (63) |
| Danijela Ercevic | Stjørnan | 121 | (34) |
| Sóley Mikkelsen | VÍF | 118 | (41) |
| Reda Kurkauskiene | VB | 112 | (17) |
| Simona Dziugyte | Neistin | 112 | (36) |
| Milica Ergic | Tjaldur | 102 | (20) |
| Lenka Ribaric | Tjaldur | 85 | (24) |
| Natasja Stamenkovic | Stjørnan | 84 | (5) |
| Alina Olaru | StÍF | 76 | (8) |
| Nicoleta Radu | VÍF | 74 | (1) |
| Jacklin Durhuus | VÍF | 72 | (6) |
| Ileana Manolescu | Kyndil | 63 | (9) |
| Laila Jespersen | VB | 60 | |

**Menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Dragisa Stojovic | Tjaldur | 141 | (17) |
| Damir Oros | KÍF | 137 | (26) |
| Sveinur Justinussen | StÍF | 117 | (19) |
| Halgir D. Olesen | H71 | 106 | (2) |
| Áki Olsen | VÍF | 97 | (7) |
| Jacob Jónsson | Kyndil | 95 | (7) |
| Morgan Knezevic | Neistin | 90 | (21) |
| Ingi Olsen | VÍF | 89 | (20) |
| Áki Mørk | Neistin | 83 | (25) |
| John Zachariasen | VÍF | 80 | |
| Costin Dumitrescu | StÍF | 72 | (14) |
| Finnur Hansson | Kyndil | 68 | (10) |
| Hans Áki Dal-Christiansen | Kyndil | 67 | (22) |
| Petur Martin Poulsen | KÍF | 66 | |
| Niels Viggo Niclassen | H71 | 65 | |

## Hondbóltsstøður

**1. Deild kvinnur**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VB | 5 | 5 | - | 0 | - | 00 | 448 | 359 | 89 | 19 |
| 2 VÍF | 6 | 4 | - | 1 | - | 1 | 416 | 342 | 74 | 17 |
| 3 Stjørnan | 5 | 1 | - | 1 | - | 3 | 367 | 371 | -4 | 11 |
| 4 Kyndil | 5 | 2 | - | 1 | - | 2 | 416 | 423 | -7 | 11 |
| 5 StÍF | 4 | 1 | - | 1 | - | 2 | 374 | 402 | -28 | 9 |
| 6 Neistin | 5 | 1 | - | 0 | - | 4 | 332 | 367 | -35 | 7 |
| 7 Tjaldur | 4 | 1 | - | 0 | - | 3 | 317 | 406 | -89 | 3 |

**1. Deild menn**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 5 | 4 | - | 0 | - | 1 | 530 | 432 | 98 | 17 |
| 2 StÍF | 4 | 2 | - | 2 | - | 0 | 454 | 394 | 60 | 15 |
| 3 Neistin | 4 | 1 | - | 1 | - | 2 | 447 | 428 | 19 | 12 |
| 4 Kyndil | 4 | 1 | - | 2 | - | 1 | 427 | 427 | 0 | 10 |
| 5 KÍF | 5 | 1 | - | 2 | - | 2 | 440 | 471 | -31 | 9 |
| 6 H71 | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 409 | 463 | -54 | 7 |
| 7 Tjaldur | 4 | 0 | - | 1 | - | 3 | 395 | 487 | -92 | 4 |



# Dømingin er hjartamálið

**Nýggi næstformaðurin í FSF kennir væl til føroyskan fótbólt, men hann ætlar at seta seg væl og virðiliga inn í nevndararbeiðið, áðrenn hann fer at siga nakað meiri ítøkiligt**

FSF ÁRSAÐALFUNDUR
*Jákup Mørk*



FSF hevur fingið nýggjan næstformann. Hann eitur Niklas á Líðarenda, og hann býr í Norðragøtu. Niklas er upprunaliga ættaður av Líðarenda á Nesi. Hann er 47 ára gamal, og hann hevur størra partin av lívinum búð í Gøtu. Niklas er giftur inn í eina stóra fótbóltsfamilju í Gøtu. Konan eitur Sonja. Hon hevur verið nevndarlimur og eisini formaður í GÍ, og hon er systir Jógvan Gregersen, sum nú er formaður í GÍ.

Niklas á Líðarenda er í føroyska fótbóltsheiminum fyrst og fremst kendur fyri at døma. Hann hevur í eina fjórðinsøld dømt í fremstu røð, og eftir Nemus Napoleon Djurhuus var hann næsti altjóða føroyski dómarin.

Tvey tey seinastu árini hevur Niklas ikki verið altjóða dómari. Í staðin hevur hann brúkt nógva tíð og orku upp á dømingina. Har hevur hann saman við Egga Jensen verið instruktørur, og teir hava eisini verið próvdómarar hjá nýggjum dómarum, og so hevur Niklas eisini verið upptikin av at styrkja eygleiðingina av dómarunum.

### Meiri hugaligt

Tá ið vit ynskja nýggja næstformanninum í FSF tillukku við valinum, takkar hann hjartaliga. Og tá ið vit spyrja hann, hvat hann fer at leggja seg eftir í nýggja nevndarsessinum, er tað náturligt, at hann fyrst nevnir dømingina:

– Endamálið má vera, at dómararnir eru góðir, og at tað er nóg mikið av dómarum. Men hetta kemur ikki av sær sjálvum. Tað er neyðugt at arbeiða miðvíst fyri at betra frálæruna og umstøðurnar sum heild hjá dómarunum. Tað er vorðið betri tey seinastu árini, men tað er langt á mál. Í veruleikanum er tað soleiðis hesum viðvíkjandi, sum tað er á so mongum øðrum økjum, at vit koma ongantíð á mál.

Hvat hugsar tú ítøkiliga um, at tað er neyðugt at gera?

– Ein at trupulleikunum er, at tilgongdin av nýggjum dómarum í bestu deildini ikki er nóg stór. Vit kunnu siga, at tað er ikki nóg stór kapping um at vinna plássini at døma í 1. deild. Veruleikin er tann, at tað eru ikki so fáir unglingar, sum fara undir dómaraútbúgvingina, og tað er eisini ein veruleiki, at nógv teir felstu av hesum alt ov tíðliga leggja floytuna frá sær.

*Hvør er orsøkin til tað?*

– At avbjóðingin tykist lítið verd av so nógvum øðrum. Dómarar, sum hava hug at døma, sleppa skjótt framat at døma í unglingadeildini og í 3. deild og kanska eisini í 2. deild. Men teir merkja skjótt, at virðingin fyri tí arbeiðnum, sum teir gera, er ikki so stór, sum hon átti at verið. Umstøðurnar hjá teimum, sum taka sær av dømingini í 1. deild, er ikki so nógv at siga til. Teir dómararnir fáa góða viðferð og verða tiknir í álvara, um tað ber til at siga tað soleiðis. Hetta kenna dómararnir, sum royna seg í lægru og yngru deildunum ikki, og tí missa nógvir teirra ov tíðliga hugin. Og tað hevur aftur við sær, at evnaríkir dómarar ikki síggjast aftur í bestu deildini, har teir ivaleyst høvdu átt eina framtíð, heldur Niklas á Líðarenda.

Niklas sigur seg ætla sær at vera við til at betra umstøðurnar hjá dómarunum, og hann heldur, at tað eigur at vera ein fyrimunur bæði fyri dómararnar og fyri FSF, at hann hevur so drúgvar royndir sum dómari.

### Innlit skal til

Umframt at hava verið ein av fremstu dómarunum í ein mansaldur, so hevur Niklas á Líðarenda tey seinnu árini eisini verið eitt sindur knýttur til FSF á øðrum økjum. Tað hevur hann verið í sambandi við altjóða dystirnar, sum hava verið í Føroyum. Serliga í sambandi við landsdystirnar hevur Niklas ofta tikið sær av dómarum og eygleiðarum, sum eru komnir henda vegin.

– Eg haldi ikki, at tað er rætt av mær at siga so nógv meiri um, hvat eg ætli mær at arbeiða við í nevndini í Fótbóltssambandinum. Eg rokni við, at allir, sum eru í nevndini, eru sinnaðir at arbeiða fyri at gagna øllum tí føroyska fótbóltinum sum heild. Talan eigur at vera um samvinnu millum alla nevndina. Eg veit, at tað krevst innlit í viðurskiftini fyri at vera førur fyri at gera dygdargott arbeiði. Tíbetur er tað soleiðis, at nevndin er samansett soleiðis, at tað eru nakrir, sum hava drúgvar royndir, meðan aðrir hava verið við í nøkur ár. Tað átti at havt verið ein góð samanseting, so eg eri spentur upp á at fara undir nýggju uppgávuna sum næstformaður í Fótbóltssambandinum.

# Húsið verður liðugt í mai

**At virði av dollaranum er so nógv fallið hevur kostað FSF eina millión í kurstapi av stuðlinum, sum FIFA á heysti í 2001 játtaði til nýggja FSF húsið**

FSF ÁRSAÐALFUNDUR
*Jákup Mørk*



Tey seinastu árini er Tórsvøllur farin við mestu tíðini á ársaðalfundinum hjá Fótbóltssambandinum. Soleiðis var tað ikki leygardagin. Tá var millum lítið og einki tos um Tórsvøll. Men húsini, sum Fótbóltssambandið eigur framvið vøllinum, vórðu nevnd í munnligu frágreiðingini, sum formaðurin í FSF, Dánjal Andreasen, hevði á fundinum.

– Arbeiðið upp á húsini gongur sum ætlað, og sambært tíðarætlanini verður innanduraarbeiðið liðugt í apríl, og ætlanin er at flyta inn í húsini um miðjan mai, segði Dánjal Andreasen, sum legði afturat at við undantaki av kurstapinum verður roknað við, at fíggjarætlanin fyri verkætlanina fer at halda uttan stórvegis frávik.

Í sambandi við umrøðuna av fíggjarstøðuni greiddi Dánjal Andreasen frá, hvussu liðugt gerðin av húsunum við Tórsvøll verður fíggjað. Tað var í tí sambandinum, at hann kom inn á nýggju sjónvarpsavtaluna, sum FSF hevur gjørt við Sportfive UFA í Hamburg:

– Sum liður í fíggingini av FSF húsinum við Tórsvøll vóru samráðingar vipð Sportfive UFA í Hamburg um møguliga leingjan av sáttmálanum um sjónvarpsrættindini. Eftir drúgvar samráðingar varð komið ásamt um ein sáttmála, sum FSF kundi góðtaka, og sum var stak góður fyri FSF. Tó vísti tað seg neyðugt at útseta ígildiskomuna av sáttmálanum. Hinvegin varð gjørd ein skipan innanfyri verandi avtalu við Sportfive, soleiðis at FSF upptók eitt reuntufrítt lán í tvey ár upp á umleið 1,9 milliónir krónur. Harafturat verður ágóðin frá Sportfive í sambandi við dystin ímóti Týsklandi útgoldin okkum frammanundan, ella í januar og februar 2003. Á henda hátt ber til at fíggja ein stóran part av kostnaðinum at gera FSF húsið liðugt. Harafturat hevur nevndin valt at brúka FIFA stuðulin fyri 2002, sum er umleið 1,8 milliónir krónur, til hetta sama endamáið, greiddi Dánjal Andreasen frá.

Og hann legði afturat:

FIFA góðkendi sjálva verkætlanina á heysti í 2001. Tá var kursurin á dollaranum umleið 8,2. Síðani er dollarin fallin í virði, og nú er kursurin 6,9. Av samlaðu upphæddini frá FIFA til verkætlanina upp á 750 túsund dollarar er talan um eitt kurstap upp á umleið eina millión krónur. Við atliti til hesi viðurskifti og til fígging av innbúgvi, søkti FSF Tórshavnar kommunu um stuðul til verkætlanina. Kommunan hevur játtað eina millión í stuðli.